# SOSIALURIN er har tað hendir

HALD SOSIALIN WWW.SOSIALURIN.FO

2000

-ver við frá byrjan!

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

| |
|---|
| Navn: |
| Búst.: |
| Postnr., bygd, býur |
| Tlf.: |
| Undirskrift: |

- ☐ Haldarar í Føroyum: 320,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Europa: 490,-/ársfj.
- ☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
- ☐ Internet: 240,-/ársfj.

sosialu...

## Hagstova Føroya

*Eitt starv er leyst at søkja á Hagstovu Føroya:*

### Fulltrúi

**Arbeiðsuppgávur**
Vit sóknast eftir einum búskaparfrøðingi sum fulltrúa til at arbeiða við tjóðarroknskapi og ymsu grundskipanunum til tjóðarroknskapin. Arbeiðið er í stóran mun í samstarvi við aðrar búskaparfrøðingar, fólk við teldukunnleika og skrivstovufólk á stovninum. Starvið kann annars umfata luttøku í ymsu uppgávunum á Hagstovuni.

**Førleikakrøv**
Hollur kunnleika til búðskaparfrøði er ein fortreyt, meðan evni til at fáast við teldur og programmering er ein fyrimunur, men ikki nøkur treyt.
Prógv krevst frá lærdum háskúla, cand. polit., cand. oecon. ella frá aðrari javntsettari útbúgving.

**Hagstovan kann bjóða**
Eitt áhugavert starv, sum gevur góðar møguleikar fyri at fáa innlit í føroyska búskapin, at fylgja við í gongdini í búskapinum og at arbeiða í einum mennandi fakligum umhvørvi.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingarfelagið.

---

Umsóknin skal vera á Hagstovuni í **seinasta lagi mánadagin tann 24. januar 2000.**
Hon skal sendast til Hagstovu Føroya, Box 2068, FR 165 Argir.

*Meira fæst at vita við at venda sær til stjóran á Hagstovuni á tel. 35 20 28, lok 250.*

---

*Hagstova Føroya er høvuðsmynduleiki fyri hagfrøðiligum virksemi í Føroyum, og er ein stovnur undir Fíggjastýrinum. Stovnurin hevur til uppgávu at gera hagtøl fyri øll týðandi samfelagsviðurskifti í Føroyum. Í løtuni starvast 13 fólk á stovninum, herav sjey við útbúgving frá hægri læristovni.*

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

## ØLL LUFTAMBOÐ og ÚTGERÐ fæst frá okkum





- ☐ *Kompressarar, nýggir og brúktir*
- ☐ *COBRA motor-borimaskinur*
- ☐ *Borihamarar*
- ☐ *Brekkarar*
- ☐ *Smyrjiapparat o.a.*
- ☐ *Borstál, t.d. borar, meitlar, borkrónur o.a.*
- ☐ *Luftslangur, koblingar, klemmur o.a.*

*Vit útvega eykalutir til flestu kompressarar og luftamboð*

**Kaj Andreasen Pf.**
*Sandvíkarhjalli - Tlf. 315600 - Fax 318008*

## Hesar ognir verða lýstar til sølu

**Ídnaðarøki á Sandvíkarhjalla til sølu**
Við hesum verður eitt ídnaðarøki á Sandvíkarhjalla lýst til sølu. Økið er til víddar 3.727 $m^2$ og liggur væl fyri. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skrivstovu okkara.

**Ognir í Trongisvági**
Vegna Føroya Skiftirætt verða niðanfyri nevndu ognir lýstar til sølu:

1. Matr. nr. 51h, Trongisvági, sum er grundøki í trøðni á Húsgarðshaga, til støddar 1606 $m^2$ við ástandandi úthúsi.
2. Helvtin av matr. nr. 64, Trongisvági. Ognin er 4 gyllin í Líðarshaga við 10.227 $m^2$ innangarðs.
3. 1/9 at matr. nr. 69a, Trongisvági, ið er eitt grundøki til støddar 2.350 $m^2$ við ástandandi sethúsum.

Skiftirætturin tilskilar sær rætt til at velja millum tilboð, ið koma inn, og til einki at góðtaka. Nærri fæst at vita við at venda sær til skrivstovu okkara.

**Advokatskrivstovan, Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**



## Tórshavnar kvøld- og ungdómsskúli

### Skeið í forteljing og kreativari skriving

Líkamikið, hvussu tú hevur tað við at skriva, um tú ikki hevur gjørt annað við tað enn stílaskriving og jólakort, ella um tær dámar at sita og skriva tankar og hugleiðingar niður, ella um tú longu hevur skrivað nógv, tú kundi funnið uppá at víst øðrum, so er hetta skeiðið eisini fyri teg.

Tað snýr seg um, at arbeiða við hugskotum, at finna mátar at fáa hugskot, ymiskar mátar at arbeiða við hesum hugskotum. Hvussu kanst tú burturúr einum orði skapa eina heila søgu? Ella úr eini mynd, einum huglagi? Hví riggar ein tekstur og ikki ein annar? Hvussu byggir man upp eina søgu, eina frásøgn?

Eisini fara vit at royna okkum í frásøgu, at siga frá kendum og minni kendum ævintýrum og kanska søgum, vit hava skrivað.

Skeiðið er hvørt hóskvøld frá 13. januar til páskir. Skeiðleiðari er Rakel Helmsdal rithøvundi. Tilmelding tlf. 317755 ella 316596.

## Nýtt lánsbræv

- sum fylgir altjóða partabrævamarknaðunum



Føroya Banki bjóðar fram eitt nýtt lánsbræv. Lánsbrævið verður skrásett á Københavns Fondsbørs og verður selt í samstarvi við Christiania Bank úr Noregi og Danske Andelskassers Bank úr Danmark.

Lánsbrævið gongur í 7 ár, gevur eina fasta rentu á 2 pst. og verður útdrigið til ein kurs, sum verður tengdur at kursgongdini á trimum altjóða partabrævaindeksum - tó í minsta lagi fyri kurs 100.

Harvið gevur lánsbrævið møguleika fyri vinningi, um partabrævakursirnir hækka, men tryggjar samstundis íleggjarum ein minstavinning.

Lánsbrøvini kunnu keypast fram til 17. januar 2000.

Nærri fæst at vita í: **Føroya Banka**
Fíggjardeildin
Húsagøta 3
100 Tórshavn
Telefon 31 13 50

FØROYA BANKI

*Lýsið í* **sosialinum**

## GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR. NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Til útisetar í Danmark**
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað



**Danstein**
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN — www.danstein.fo

## Aliskeið

Fiskivinnuskúlin skipar fyri tveimum skeiðum til alivinnuna í februar 2000. Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjum skeiði.

| | |
|---|---|
| **1. skeið:** | **Skeið fyri alarar á sjónum 7. og 8. februar 2000** |
| **2. skeið:** | **Skeið fyri smoltalarar 14. og 15. februar 2000** |
| **Málbólkur:** | Starvsfólk í føroysku alivinnuni, sum ikki hava serliga útbúgving |
| **Fortreytir:** | Luttakarar skulu hava arbeiðsroyndir í alivinnuni |
| **Undirvísarar:** | Serfrøðingar í føroysku alivinnuni |
| **Skipan:** | Skeiðini verða skipað sum vistarskeið á Hotel Eiði |
| **Skeiðskostnaður:** | Kr. 3.500 fyri hvørt skeiðið (verður kravt inn undan skeiðunum). |

Undirvíst verður m.a. í:
Laksalívfrøði, fysiologi, fóður og fóðring, aling og umhvørvi, ljós, kynsbúning og vøkstur, smáverur, sjúkufyribyrging, smoltifisering, vatndygd, reinsing, resirkulering, tøka, hagreiðing og útflutningur.

Freistin at melda seg til skeiðini er **21. januar**. Tilmelding fer fram við at ringja til Fiskivinnuskúlan á tlf. 42 45 73, ella um teldupost: fiskvest@fiskvest.fo . Til ber eisini at senda ella faxa okkum innskrivingarseðilin niðanfyri. **Tilmeldingin er bindandi.** Skeiðini eru treytað av nóg stórari undirtøku.

**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96, 350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73 • Fax. 42 44 28

**Innskrivingarseðil til aliskeið**

**Smoltskeið:** ___ Set kross — **Aling á sjónum:** ___ Set kross

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/Arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tlf. arbeiði: |
| Postnr./stað: | Tlf. heima: |
| Teldupostur: | Gjaldari: |